# Amerikanarar á stuttleikaferð í Føroyum



*Hesin stuttleikabáturin er skrásettur í Cayman Islands. Hann kom á Havnina sunnudagin og fer avstað aftur fyrsta dagin. Manningin telir nakrar amerikanarar og onkran íslending. Teir eru komnir úr Íslandi og fara nú víðari úr Føroyum til Skotlands ella Hetlands.*

*Mynd: Finnur Justinussen*

## Gjørdi seg inn á løgregluna

Ein maður er skuldsettur fyri at »have trykket sin bare ende op mod politibilen.« Maðurin er handtikin.

Umframt tað tók maðurin eina hjulskál av løgreglubilinum. Hetta hendi í Havn uttanfyri ein klubba klokkan 03:30 leygarmorgunin. Maðurin er eisini skuldsettur fyri harðskap móti løgreglumanni.

## Hóttur við knívi

Ein hýruvognsførari varð fríggjamorgunin klokkan trý hóttir við knívi. Maðurin við knívinum varð meldaður til løgregluna, sum tók mannin inn. Hann er nú skuldsettur, men hann varð ikki stillaður fyri grundlógarforhoyr. Kriminaldeildin kannar málið.

## Innbrot á Margarinfabrikkini

Hósmorgunin var innbrot á Margarinfabrikkini í Havn. Pengar vórðu stolnir. Kriminaldeildin í Havn kannar nú málið.

## Misti koyrikortið

Hóskvøldið misti ein maður koyrikortið. Hann hevði eitt fyribils koyrikort, sum ikki var endurnýggjað.

## Koyrdi fullur

Ein maður koyrdi fullur í Klaksvík klokkan 6:40 fríggjamorgunin. Tveir mans vóru í bilinum, og teir koyrdu eisini útav Ánavegnum. Eingin persónsskaði varð, men førarin er skuldsettur og stendur til at missa koyrikortið. Hin maðurin, sum sat í bilinum, er eisini skuldsettur og kann missa koyrikortið, tí hann skal hava togað í róðrið.

## Smíðaðu hús Dýra Biðjudag

Í Vestmanna vóru menn farnir á smíða hús klokkan tíggju á morgni Dýra Biðjudag beint við Missiónshúsið, tá onkur hevði ringt til løgregluna. Vanligt er, at gangur skal ikki haldast á slíkum degi, og løgreglan gav monnunum boð um at gevast við smíðingini. Og so vóru ikki fleiri hús smíðaði tann dagin í Vestmanna.


Kílaskorin longutong



Her er Herdis. Hon er flakakvinna. Í dag er Herdis farin at skera upsafløk til sveisiska marknadin. Herdis er ein ímynd av, at tad hevdi loyst seg hjá henni at tikid støðu til røttu trygdina.

Føroya Lívstrygging kann bjóda eina trygd, id júst nøktar persónliga tryggingartørvin. Skipanin eitur Persónlig eftirløn og er ein skræddaraseymad loysn vid bædi trygging og eftirløn.

Ups...

Persónlig eftirløn er ein eftirlønarskipan við innbygdari trygging.
Persónlig eftirløn er grundað á, at ávíst gjald verður goldið inn í tryggingina, við skattafrádrátti.
Tá ið eftirlønin verður goldin út, stendur tær frítt fyri, hvussu hetta skal gerast.
Veljast kann ímillum at fáa alt goldið út í einum ella sum mánaðargjald.

Kílaskorin longutong

Føroya Lívstrygging · Kopargøta 1 · Postsmoga 206 · 110 Tórshavn · Tel 311111 · Faks 351110
heimasíða www.liv.fo · teldupostur liv@liv.fo

Føroya Lívstrygging

REPROZ